FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

J.Nr.: 19/00420-2

Svar uppá spurning nr. 15/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um tunlarnar norður um Fjall.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Verður farið undir tunlarnar norður um Fjall, tá Hvalbiartunnilin er skotin ígjøgnum?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin, at nýggju tunlarnir norður um Fjall eru lidnir?

Svar:
Landsstýrið arbeiðir við at raðfesta íløgur í tunlar, undirsjóvartunlar, vegakervi og ferjur innanfyri langtíðar løgukarmin. Arbeiðið við hesum ikki er komið á mál, men sum upplýst í svari til líknandi § 52a spurning frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, eru tunlarnir norður um Fjall raðfestir fremst av teimum stóru tunnilsverkætlanunum. Í sama svari varð eisini upplýst, at ætlanin er at fara undir tunlarnar norður um Fjall, so skjótt Hvalbiartunnilin er liðugur, men at samgongan eisini kannar møguleikar at framskunda verkætlanina.

Í heyst samtykti Løgtingið eina eykajáttan á 21 mió. kr. til at framskunda verkætlanina við Hvalbiartunnilinum, ið eftir ætlan verður borðaður ígjøgnum komandi ár. Hetta hevur við sær, at farast kann undir tunlarnar norður um Fjall fyrr enn ætla, men enn er kortini nakað tíðliga at siga, nær teir verða lidnir. Hetta er m.a. treytað av, hvussu raðfest verður innanfyri langtíðar løgukarmin. Leggjast kann afturat, at arbeiðið við at projektera tunlarnir norður um Fjall er ígongd og verður ætlandi liðugt komandi mánaðirnar.

Tinganes, 18. november 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum